

# Forkunnug føroysk filmsmentan

**Skapandi ungdómur í einum góðum umhvørvi. Summi klippa, meðan onnur fáast við ljós, ljóð og leikrit. Í sjónvarpshølunum hjá Kringvarpinum arbeiða næmingarnir, sum luttaka á FISK 2006, nátt og dag fyri at fáa stuttfilmarnar lidnar: - Ein nýggj og spennandi filmsmentan er á veg til Føroya, siga tey avgjørd.**

MENTAN
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*
*Myndamaður: Jens Kr.*

Hóast flestu næmingarnir á FISK 2006 hava nógv um at vera, fingu vit órógvað teir eina tíma seinnapartin í gjár.

Tey fimm ungu, vit fingu orðið á, hava øll valt at fara á FISK 2006, tí tey hava stóran áhuga fyri filmi og ætla somuleiðis møguliga at lesa víðari innan filmsvinnuna:

– Vit ynskja øll at leggja lunnar undir eina nýggja føroyska filmsmentan. Hesin skúlin birtir í øllum førum upp undir, at fleiri føroyskir filmar verða gjørdir, siga tey, men ivast tó stórliga í, um filmmentanin í framtíðini verður ein nýggj vinna hjá føroyingum:

– Men vit verða í øllum førum sett á heimskortið á ein øðrvísi hátt. Vit vóna, at skúlin verður á hvørjum ári, so fleiri føroyingar kunnu fáa høvi til at royna seg á filmsøkinum, siga tey samd, og Turpin leggur afturat, at um ein ætlar sær at lesa okkurt innan filmsvinnuna, er tað avgjørt eitt hugskot at fara á FISK:

– Føroyingar kenna ov lítið til at gera film. Førleikin skal hava teir røttu karmarnar at vaksa í. Um gróðrarbotnurin ikki er har, so ber einki til. Og tað er einki at ivast í, at tann rætti botnurin er á hesum filmsskúlanum, sigur Turpin bjartskygdur, og Andreas leggur afturat, at hann hevur verið á øðrum filmsskúlum uttanlands, og at føroyski skúlin er á einum betri støði enn teir skúlarnir, hann hevur roynt:

– Eg havi eitt nú verið á NUF (kendur norskur filmsfestivalur, blaðm.), og umstøðurnar á føroyska filmsskúlanum eru nógv betri.

– Her fær ein veruliga blóð á tonna. Føroyski filmsskúlin líkist sera nógv einari veruligari filmsframleiðslu uttanlands, sigur Franklin, og hini benda høvdið kvikliga eitt sindur framyvir og uppaftur.

## STUTT UM FISK 2006

FISK 2006 er ein norðurlendskur filmssummarskúli, sum í hesum døgum er í Føroyum. 15 ung úr øllum Norðurlondunum luttaka á skúlanum, sum hesaferð varar í fjúrtan dagar.

Skúlin vendir sær til ung, sum hava royndir innan film, ynskja at menna sítt filmsarbeiði bæði fakliga og listaliga og hava ambitiónir ella hugsa um at fáa sær eina yrkisleið innan film.

Lærararnir á FISK 2006 eru allir professjonellir innan filmsvinnuna. Lærararnir á skúlanum eru hesir: Filmsleikstjórin Joachim Bergenstråhle úr Svøríki, ljóðmaðurin Jyrki Saarinen úr Finnlandi, klipparin Anders Villadsen og myndamaðurin Henrik Bohn Ipsen úr Danmark.

Næmingarnir á skúlanum hava higartil arbeitt ídnir frá morgni til myrkurs í fýra bólkum. Fyrstu vikuna framleiddu bólkarnir fýra venjingarfilmar, men hesa vikuna skulu bólkarnir gera ein stuttfilm og ein dokumentarfilm. Endabresturin á skúlanum verður á G!. Tá verða filmarnir vístir á stórskíggja fyri øllum áhugaðum.

Áðrenn skúlin fór í gongd, høvdu næmingarnir fyrireikað seg til skúlan umvegis eina heimasíðu. So tá næmingarnir hittust á skúlanum, vóru teir klárir til at fara í gongd við at framleiða stuttfilmin.

Vikuna áðrenn skúlin byrjaði, lýsti skúlin eftir leikarum til filmarnar. Nógvir leikarar við royndum á palli vóru áhugaðir, og eru nakrir av teimum við í filmunum.

Norðurlendski Filmssummarskúlin er stuðlaður av Nordisk Kulturfond, Mentamálaráðnum og Atlantic Airways

Til ber at lesa meira um FISK 2006 á heimasíðuni www.fisk2006.org.